## Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# FØROYAR ATKVØDDU FYRI KRÍGGI

Fríggjadagin høvdu Høgni Hoydal og Edmund Joensen – okkara umboð á fólkatingi – møguleikan at atkvøða í danska fólkatinginum og harvið siga dønum, at vit halda nakað annað enn Danmark um tað at fara í kríggj.

Men tað gjørdu teir ikki. Hinvegin er Høgni Hoydal firtin inn á Lene Espersen, tí hon ikki spurdi okkum og grønlendingar áðrenn. Tí hon røkir okkara trygdarpolitikk. Og rætt hevur Høgni Hoydal. Sjálvandi átti hon um ikki annað at kunnað okkum, so kundi hon látið sum um, at vit vórðu tikin upp á ráð.

Men hinvegin hevði Høgni Hoydal møguleikan at atkvøða NEI ella blankt á fólkatingi fríggjadagin. Men tað gjørdi hann ikki. Hann atkvøddi faktiskt JA. Og ja atkvøddi hann við ikki at møta upp. Og flestu fólkatingslimir hava eina smarta fráveruskipan – vit kundu til stuttleika kalla tað eina skulkiskipan. Um ein, sum fer at atkvøða *nei* ikki møtir upp, so letur ein, sum ætlaði at atkvøða *ja* vera við at atkvøða. Hetta kalla tey eina »claringsskipan«, men slíkari skipan er Høgni helst ikki partur av.

Men hann er ein av teimum, sum møtti ringast upp til løgtingsfundir í fjør. Hann hevur funnist at Sosialinum fyri at almannakunngera fráverurnar hjá tingfólkum, tí tær vísa ikki veruligu myndina av, hvørji tingfólk gera nakað til nyttu. Tað kann hann eisini hava rætt í, men løgtingið skrásetir á hvørjum fundi, hvør møtir. Hesi tøl eru almenn. Men tá man skal sita í parlamentum í fleiri londum, so sigur tað seg sjálvt, at man fær trupulleikar at møta upp.

Meðan Høgni Hoydal var landsstýrismaður í 2008 røkti Sjúrður Skaale fólkatingsstarvið fyri hann. Sjúrður Skaale staðfesti tá, at tað ber ikki til at gera eitt ordiligt arbeiði í báðum parlamentunum. Tí segði hann tingsessin frá sær permanent, sum tann fyrsti nakrantíð. Men Høgni Hoydal hevur ongan trupulleika at røkja báðar sessirnar og at standa á odda fyri andstøðuni á løgtingi.

Øll eru samd um, at Gadaffi er ein búrhundur, sum skal fáast frá valdinum. Men er tað nú rætt at bumba landið sundur og saman? Skulu vit



hava eitt nýtt Irak? Er tað rætt, at so nógv sivilfólk skulu líða?

Amerikanarar hava verið fleiri ferðir á mánanum. Løgið, at teir ikki klára at senda onkra Schwartznegger-typu til Libya at handtaka – ella gera av við – Gadaffi. Ella hevur tað so stóran týdning fyri at vesturheimin at royna sína krígsútgerð?

Tað má kennast beiskt at vera við til at senda eitt land í kríggj. Í so máta skilja vit sera væl Høgna Hoydal. Men man kann ikki ráða allastaðni.

Atkvøðugreiðslan í Fólkatinginum fríggjadagin var tó greið: 110 atkvøddu fyri. Eingin ímóti og eingin atkvøddi blankt.

**Tað má kennast beiskt at senda eitt land í kríggj**

# Ov lætt at dusa sær við Other People's Money...

Undan tingviðgerðini av Tryggingarsamtakinum mikudagin, legði Tryggingarfelagið eitt kunningarskriv á heimasíðuna, har felagið vísir á, at tað slett ikki er so óvanligt, at fráfarnir stjórar flyta yvir um borðið og gerast nevndarformenn. Og so verða nevnd ymisk dømi úr Danmark. Felagið roynir eisini at verja seg ímóti kritikkinum um løn og samsýning til nevnd, umboðsráð og stjóra og sigur:

*»Til hetta er at siga, at tað er væl skilligt, at fólk halda, at talan er um høgar samsýningar. Men um samsýningar til nevndarlimir og stjórn í TF samtakinum verða samanlíknaðar við tílíkar samsýningar í líknandi fyritøkum, so eru tær í roynd og veru lægri í TF samtakinum.«*

Síðani verður boðað frá, at umboðsnevndarlimir fáa 4.000 krónur um mánaðin.

Lopið verður lætt og elegant um, hvør lønin er hjá stjórn og nevndarlimum. Í fjør hækkaði nevndin sær samsýningina munandi. Kanska tað var tí, at Tryggingin fylti 70 ár. Men í ár hevur felagið keypt ein banka. Tað plagar at vera høvi hjá nevndarlimum í slíkum feløgum at hækka sær samsýningina munandi. Munnu tey hava gjørt tað í TF Holding?




So góði Regin Hammer. Svara nú okkum, sum eiga Tryggingarsamtakið, hesum spurningum:

*– Hevur stjórin fingið eyka samsýning fyri stríðið at keypa Eik Banka?*

*– Hevur fyrrverandi stjórin fingið eyka samsýning fyri at keypa Eik Banka?*

*– Hava nevndarlimir fingið eyka samsýning fyri at keypa Eik Banka?*

Tað virkar nærmast misteinkiligt, at tryggingarfelagið almannakunnger lønirnar hjá teimum 23 umboðsráðslimunum, men ikki hjá nevndarlimum og stjórn. Felagið eigur at siga okkum, um nøkur nevndarsamtykt er gjørd um at hækka nevndu samsýningar í ár aftur fyri »stríðið« at keypa Eik Banka.

Tað ljóðar so pent at siga, at »hetta er vanligt í líknandi feløgum«. Men í Føroyum hava vit ikki líknandi feløg. Men vit hava nógvar nevndarriddarar, sum tjena feitt upp á at sita í ymsum nevndum, har samsýningarnar eru fullkomiliga úti av proportiónum.

Tað krevur álit at arbeiða við »Other People's Money«, og trúvirðið hjá Tryggingarsamtakinum og Eik Banka er í vanda, um stjórn og nevnd vísa arrogansu heldur enn opinleika.



**Byggið fyri milliard mitt í Havn**

MOURITS M. JOENSEN
KJAK Á SÍÐU 18



**Síggja møguleikar í Hetlandi**

TÍÐINDI Á SÍÐU 20-21

# Hatta var ov tápuligt Gerhard!

Herfyri setti Sosialurin sjóneykuna á fíggjarstøðuna hjá Skopunar Kommunu – og tað er ikki hissini lesnaður. Kommunan hevur brotið láníforboðið frá Fíggjarmálaráðnum og er í veruleikanum rend á húsagang.

Og so skuldi tú hildið, at ábyrgdarpersónarnir í kommunustýrinum tóku í egnan barm og skammaðust.

Men nei. Gerhard Lognberg, borgarstjóri og løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin, leggur alla ábrygd frá sær. Hann gevur hinum skuldina. Kommunan gjørdi eina íløgu í eina útstykking »på forventet fangst«, tá tað sá út til, at Sandoyartunnilin gjørdist veruleiki. Tá til stykkis kom, so var eingin áhugi at keypa grundøki í Skopun.

*– Altso Gerhard og tit í Javnaðarflokkinum. Hetta er ov langt úti. Hetta er í besta lagi tápuligt. Vónandi er tað ikki politikkurin hjá Gerhardi Lognberg í Skopun, sum er grundarlagið undir fíggjarpolitikkinum hjá Javnaðarfokkinum.*

*Flokkurin eigur at rudda fyri egnar dyr, annars kann fær flokkurin ikki fólksins álit aftur.*



**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,** sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*